

# Framleiðslan minkaði hjá Atlantic Petroleum

**Jan Müller**

04.11.2013 - 22:30

Oljan.fo

Ein tilrættaløgd umvæling á feltum hjá Atlantic Petroleum minkaði munandi um oljuframleiðsluna í oktober. Hon órógvaði eisini framleiðsluna í september. Hetta sigur felagið frá í eini fráboðan í morgun.

Tilsamans var framleiðslan í oktober 39.000 tunnur, ein minking frá 53.000 tunnum í september. Árligu umvælingarnar eru nú lidnar skrivar felagið.

Við framleiðsluni í oktober er samlaða framleiðslan í 2013 604.000 tunnur. Atlantic Petroleum væntar eina samlaða árliga framleiðslu millum 725.000 og 800.000 tunnur. Harvið tørvar felagið millum 121.000 og 196.000 tunnur í teimum báðum mánaðunum, sum eru eftir av árinum.

Í fráboðanini frá Atlantic Petroleum verður eisini sagt frá, at ein framleiðslubrunnur afturat á Ettrick verður koblaður til í næstum, og at felagið harvið væntar, at Ettrick framleiðslan økist við 50% uppá stutt sikt.

Keldur
Ritzau/FINANS
Atlantic Petroleum
EnergiWatch

 